tíðindablaðið
sosialurin
Nr. 107 Hósdagur 11. juni 1998 | 72. árgangur | www.sosialurin.fo | Kr. 8,00

# Avtalan er betri enn eg hevði væntað




Tað heldur Sigurd Poulsen, landsbankastjóri, um avtaluna, sum landsstýrið og danska stjórnin undirskrivaðu gjáranáttina.

– Talan er um eitt stórt endurgjald, og við eitt eru fíggjarligu umstøðurnar hjá landskassanum broyttar munandi, sigur hann

**Síða 5**



# Landsstýrið og stjórnin myrkalagt bankamálið

– Tað er lagt eitt so tjúkt roykslør yvir bankamálið við hesi avtaluni, at eftirtíðin kann ongantíð siga, hvussu nógv vit fingu í endurgjaldi fyri tann órætt, sum varð gjørdur móti okkum í hesum málinum.

Jóannes Eidesgaard, fólkatingsmaður og formaður í Javnaðarflokkinum, heldur, at avtalan í sjálvum sær er góð, men hann hevur alla tíðina víst á, at bankamálið og skuldin ikki áttu at tvinnast saman

**Síða 8**

# Bert neystið er eftir



Umstøðurnar hjá kappróðrinum á eystara armi av Skálafjørðinum hevur ikki verið av teimum bestu seinastu árini, og einki neyst er til bátarnar. Men tað verður nú broytt, og væntandi byrjar arbeiðið upp á eitt nýtt kappróðrarneyst longu um ein mánað

**20 síður um Skálafjarðarstevnuna**

